# Summarkappingin: Ferðamálið er Reykjavík



Reykjavík er størsta býurin í Reykjavík. Her búgva í dag 118.000 íslendingar, og verða forstaðirnir taldir við, er talið nærri 200.000 – og tað svarar til 2/3 av íbúgvum Íslands

**Aftur í summar bjóðar Sosialurin til eina spennandi kapping, hesaferð í samstarvi við Rás2. Kappingin byrjaði fyrr í dag á rásini, og varir henda mánaðin út, har flogferðir við uppihaldi fyri tveir persónar verða burturlutaðar tríggjar ferðir um vikuna.**

Hesi seinastu árini hevur Sosialurin skipað fyri summarkappingum við góðum vinningum. Her hava fólk savnað puntar saman fyri at vera við í lutakastinum um ein hóp av góðum vinningum. Okkurt árið luttóku 3500 fólk í kappingini.

Nú leggja hesi báðir miðlarnir til brots aftur, í samstarvi við Atlantsflog, við eini einfaldari, men kortini sera spennandi kapping.

Fyri at vinna hesar góðu vinningarnar, skalt tú í roynd og veru bert svara rætt uppá fimm spurningar. So ert tú við.

Mannagongdin er henda: Hvønn dag, tá Sosialurin kemur út, fer Rás2 - millum klokkan 9 og 12 - at seta fokus á summarkappingina og tað ávísa ferðamálið á rutunetinum hjá Atlantsflogi. Talan er um mánadag, mikudag og fríggjadag.

Fyri at vera við, skulu fólk frammanundan senda eitt sms til 1941 við tekstinum: summar. Hvørt sms kostar 20 kr. + vanligan takst. Millum tey ið hava sent inn, verður drigið um hvør sleppur ígjøgnum í studio. Hesin lurtarin fær fimm spurningar, og klárar hann at svara rætt upp teir allar innan ávísa tíð, hevur hann vunnið ein ferðaseðil við uppihaldi í Billund fyri tveir persónar eitt ávíst tíðarskeið.

Svarini uppá hesar fimm spurningarnar eru at finna í Sosialinum frammanundan. Tí kann ein lættliga svara spurningunum, meðan ein situr við blaðnum frammanfyri sær.

Vælkomin at vera við. Og góða ferð til Reykjavíkar fyri tann hepna!

